# almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

**Umsóknir**

Sendið umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. til:

Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

Í seinasta lagi 12. des. 2007, kl. 12.00.



## Økisdeildin í Tórshavn

### HEVUR TÚ HUG TIL SOSIALT ARBEIÐI?

Almannastovan søkir eftir einum starvsfólki til økisdeildina í Havn.

Uppgávurnar hjá Almannastovuni eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur.

Soleiðis er arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá Almannastovuni at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og fíggjarligar veitingar. Hartil skal Almannastovan fáa til vega og greina hagtøl til politiska myndugleikan.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, námsfrøðingur, samfelagsfrøðingur, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at gera mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á.

**Starvið**
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut yvirfyri borgarum, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd, at fyribyrgja sosialum trupulleikum og at hjálpa, tá trupulleikar koma í.

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, á telefon 353570, ella á fartelefon 215468.

Vinarliga merkið brævbjálvan: "Økisdeildin í Havn".

## Arbeiðsmarknaðardeildin

### HEVUR TÚ HUG TIL SOSIALT ARBEIÐI?

Arbeiðsmarknaðardeildin søkir eftir einum ráðgeva sum barnsburðaravloysara. Starvið er við niðursettari tíð, við 3/4 býti.

**Um deildina**
Arbeiðsmarknaðardeildin hevur til uppgávu at tæna borgarum, sum av sosialum ella heilsuligum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika, og tí mugu hava stuðul fyri at blíva arbeiðsliga og fíggjarliga sjálvbjargin. Á deildini starvast í løtuni 10 sosial- og arbeiðsmarknaðarráðgevar, umframt ein skrivari og ein deildarleiðari. Deildin er landsumfatandi við sæti í Tórshavn.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, námsfrøðingur, samfelagsfrøðingur, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at gera mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi arbeiði kunnu vera ein fyrimunur.

**Starvið**
Arbeiðs- og ábyrgdarøkið er í høvuðsheitum:
- geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- gera ætlanir fyri at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin, herundir avtalur við arbeiðsgevarar
- viðgerð av fíggjarligum veitingum
- gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensjón
- tilráðing og uppfylging í endurbúgvingarmálum, vardum størvum, arbeiðsroyndum v.m

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hallur Thomsen, deildarleiðara, á telefon 353570, ella á fartelefon 215488.

Vinarliga merkið brævbjálvan: "Arbeiðsmarknaðardeildin".

## Veitingardeildin

### MÁLSVIÐGERAR TIL VEITINGARDEILDINA

Hevur tú hug at royna teg í einum arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning, er hetta møguliga nakað fyri teg. 2 størv sum málsviðgeri á Veitingardeildini á Almannastovuni eru leys at seta í frá 1. februar 2008, ella skjótast gjørligt.

Um dagpeningalógin verður broytt komandi ár, verður tørvur á fýra málsviðgerum aftrat.

**Um deildina**
Deildin umsitur flestu veitingar innan dagpengar, barnagjald, fólkapensjón, fyritíðarpensjón og stuðul til uppihaldspening. Almannastovan umsitur umleið 900 mió. kr. árliga og umsitur Veitingardeildin mesta partin av hesum.

Talan er um eitt arbeiðsumhvørvi, sum er undir støðugari menning og má tann, ið sett/-ur verður, tola broytingar í starvsinnihaldinum. Á deildini starvast í løtuni 9 málsviðgerar, 2 fulltrúar og 1 deildarleiðari.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving, ella aðra vikomandi útbúgving. Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur royndir innan almenna umsiting ella líknandi starvsroyndir. Krøvini annars til umsøkjarar eru, at viðkomandi:

- er smidligur og hevur góð samarbeiðsevnir
- dámar væl fakligar avbjóðingar, har lógir og veitingar ganga hond í hond
- evni og vilja at arbeiða saman við øðrum toymum og miðstøðum
- hevur yvirlit og er før/ur fyri at arbeiða við fleiri uppgávum í senn
- hevur góð evni at umstilla seg, tá broytingar henda
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hollan kunnleika til KT

Starvsfólkið skal luttaka á útbúgvingartiltøkum hjá Almannastovuni.

**Arbeiðs- og ábyrdarøki**
- Pensjónsmál – útrokning, áseting, ávísing og annað
- Dagpeningamál – viðgerð, avgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Forskotsrindan av barnagjaldi - viðgerð, avgerð, áseting og ávísing
- Uppihaldspeningur – viðgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Aðrar uppgávur

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og er lønt í lønarbólki 3.

**Nærri upplýsingar**
Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Tummas E. Djurhuus, deildarleiðara, á telefon 353510, ella á fartelefon 215476.

Vinarliga merkið brævbjálvan: "Veitingardeildin".

KREA